# Miðvikan

Framhald frá síðu 33



*Feðgarnir í Tjørnuvík Jógvan Elias og Henge. Teir fylgdust í lívinum og teir fylgdust í deyðan*



*So tætt lógu skipini*



*Jákup Mikael Tjørnudal á grøvini hjá abbanum, pápabeiggjanum og øðrum í ættini*

## Tá Sannilena misti vinmannin við Ernestinu

Tá so langt er fráliðið, kann tað vera ringt at finna fram til nakað nýtt um eina slíka hending. Men eg var so heppin at koma at kenna Susanne Malene, vanliga kallað Sannilena, á Lofti á Eiði, ættað úr Tjørnvík. Sannelenu restaði bert fáar mánaðir í at gerast 100 ára gomul. Hon mintist væl til og dugdi sera væl at greiða frá.

Í 2004, tá ið Sannilena var 96 ára gomul, greiddi hon FF-blaðnum frá tí sambandi, sum hon hevði við hesa hending.

Sannilena var vinur við Jógvan Hendrik, Henge, sum fórst saman við pápanum Jógvan Elias Heinesen.

Sannilena greiddi frá:

### Henge var fráhaldsmaður

Vit vóru rættiliga javngomul. Hann var eitt ár yngri enn eg. Mammur okkara vóru systkinabørn. Vit plagdu altíð at spæla saman, og vit vóru altíð so ómetaliga væl. Henge var júst farin uppí Losjuna á Eiði, sum tá var í blóma. Hetta vísti, at hann var ein drongur við stirðil og vilja. Hann fekk til tað síðsta víst, at hann meinti tað at halda seg frá rúsdrekka.

Henge hevði føðingardag tann 31. mars. Hann vildi fylt 21 ár í 1930. Og heldur enn at skeinkja fyri manningini keypti hann ein kassa av sigarum við sær at bjóða føðingardagin. Men hetta náddi hann júst ikki.

Eg minnist sera væl seinastu ferð, eg var saman við Henga. Tað var um føstulávint, at eg skuldi fara til Havnar at læra at seyma.

Fyrsti partur av leiðini skuldi vera at ganga suður á markið millum Tjørnuvík og Haldarsvík, sum er ein hampuliga drúgvur teinur. Hagar skuldi drongur mín, Pedda, koma eftir mær av Eiði. Eg skuldi so fara av Eiði til Havnar.

Men eg hevði brúk fyri onkrum at bera viðførið fyri meg, og hetta gjørdist Henge. Hann var altíð so makaleysur, so hann játtaði at koma við mær, áðrenn hálvtalað var orðið.

Vit skiltust so, og vit væntaðu at síggjast aftur, tá skipini komu heim aftur.

### Óskiljiligt skav

Eg fór so til Havnar og búði í Qullingsgarði, har eg lærdi at seyma hjá konu Wentsel Petersen. Men so var tað eitt kvøldið, táið eg skuldi fara til songar. Tá hoyrdi eg eitt slíkt merkiligt skav. Eg fór at hyggja, men varnaðist einki. Eg hoyrdi skavið stóran part av náttina og fekk illa sovið. Um morgunin spyrji eg húsfólkið, um tey hava hoyrt nakað. Nei, tað høvdu tey ikki. Eg spurdi, um tey áttu nakra kettu, sum kundi hava verið orsøkin. Nei, hetta var so heldur ikki frágreiðingin.

Hvussu var og ikki, seinni vísti tað seg, at tað var júst hesa náttina, at vinmaðurin skolaði út av Ernestinu.

Tað var sjálvsagt sera sárt at frætta hesi tíðindi. Eg fór eisini til Tjørnuvíkar at fylgja. Eg keypti ein krans frá Petur Alberg, hann sum gjørdi lagið til tjóðsangin. Petur pakkaði kransin væl í eina eskju, so eg kundi hava hann í hondini, táið eg fór við báti og til gongu tann langa teinin norður til Tjørnuvíkar. Tað var eisini syrgiligt at síggja hesar tvær kisturnar inni í stovuni hjá Kellu. Pastor Grøn talaði, og tað var nógv fólk til jarðarferðina.

Sannilena giftist á Eiði við Pedda á Lofti, og teirra fyrsta barn varð uppkallað eftir feðgunum Jógvan Hendrik og Jógvan Elias. Dóttirin eitur nevniliga Herdis Elina.

Sannilena hevði mann, sum eisini var fiskimaður, og hon plagdi at siga at "eg havi altíð verið so góð við sjómenninar. Tað, teir forvinna, eru dýrt keyptir pengar."

## Diurin var á somu leið sum Ernestina

Tað kunnu neyvan vera nógvir føroyskir fiskimenn, sum vóru á somu leiðum, sum Ernestina hendan feigdardagin í 1930, og sum enn eru á lívi.

Men ein vita vit so um. Tað er tann 101 ára gamli Andreas Djurhuus, ættaður úr Porkeri, vanliga kallaður Diurin, sum tá var 21 ára gamal.

Hann var á hesum leiðum júst tá. Hann minnist eisini so ótrúliga væl, og hann minnist eisini hendan dagin, tá ið vanlukkan við Ernestinu hendi.

Diurin var við City of Norwich. Hetta var ein slupp úr Vági, sum Diurin var við í fýra ár. Skipari var Gunnar Danielsen, ættaður úr Søldarfirði, men búsitandi í Vági.

Diurin minnist, at teir eisini lógu bakk hendan dagin. Í veruleikanum var hetta ikki tað ringasta, sum kundi henda. Tað var vanliga so strævið, tá fiskað varð, at tað kom væl við at fáa ta hvíld, sum ein bakkdagur var.

Manningin var býtt upp í eina deksvakt og frívakt. Var frívakt var friður at vera í koyggjuni. Deksvaktin skuldu altíð vera tøk, um hon so var í lugarinum og menninir eisini kundu leggja seg oman á dýnuna. Men tað vóru altíð tveir mans, sum høvdu útkikk.

Skipini lógu fyrst spakuliga inn eftir, tá tey lógu bakk. Tá hildið var, at komið var nóg nær landi, varð vent út aftur. Tað kundi væl henda, at bakkveður var í fleiri dagar.

Allur flotin lá annars úti á grynnini. Skipini lógu so tætt, at tað bar til at síggja menninar á dekkinum. Tað vóru eisini ein rúgva av skipum. Føroyingar høvdu upp til 150 skip við 3.500 monnum undir Íslandi í senn um hesa tíðina.

Tað kundi vera sera ójavnt veður á Suðurlandinum. Diurin sigur, at tað kundu vera heilt ár uttan nakran bakkdag.

Skipini vóru annars sera ymisk. City var eitt so gott sjóskip, at teir mistu ikki eina skottfjøl av óhappi, meðan Diurin var við.

Men hinvegin, so kundi eisini vera rættulig ódn sum í 1932, tá ið Immanuel og Laura gingu burtur. Tá var Diurin á veg til Íslands við Norðfarinum.

Tá skipini veiddu á Suðurlandinum, vóru ikki nógvar havnir at koma inn til. Tað Diurin minnist mest til er Vestmannaoyggjarnar og Reykjavík. Hann fortelur eisini, at tá ið teir fóru inn í Reykjavík, tóku teir tey tøku toskarhøvdini inni við sær. Tey blivu seld í Reykjavík, og tað sum kom inn, býttu teir millum sín at keypa fyri í landi.

Fyri at koma aftur til henda vanlukkudagin í 1930, so gekk tað ikki leingi til hetta frættist til hini skipini, hóast eingin telefon var umborð. Men skipini sigldu uppá prei hjá hvørjum øðrum, og tað, sum fyrst eitt skip frætti, frættist skjótt til øll hini.

Skipini kendu eisini hvørt annað, so tey varnaðust eisini um eitt teirra manglaði, tá veður var aftur at fiska. Tað varð eisini fylgt við, um skip fór at sigla heim. Tá heysaði tað flaggið, og so vistu hini skipini tað.

**Komandi partur**
verða millum annað frásagnir frá Eliseus Jacobsen av Syðradali, sum kona hansara Lisa greiddi frá, og frásøgn hjá Torleif Justinussen um pápa hansara Ísak. Báðir komu frá Ernestinuvanlukkuni við lívinum.